# Nógv virksemi í Eliaskirkjuni

**Í føroysku Eliaskirkjuni í Keypmannahavn er nógv virksemi. Møti og sunnudagsskúli hvørja viku, legur og evnisdagar eru bert onkur av teimum føstu tiltøkunum. Evnisdagur verður komandi leygardag, har evnið verður bíbliulesnaður og andaktslív**

KIRKJULÍV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Flestu føroyingar munnu vita av føroyska arbeiðinum í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn. Har savnast nógvir føroyingar um Guds orð. Leygarkvøld til møti og bønarmøti og sunnudag til sunnudagsskúla við børnunum.

Nógv annað virksemi er í kirkjuni, til dømis ein bókasøla, bíbliutímar og á hvørjum heysti verður skipað fyri legu, har endamálið er bæði at styrkja trúnna og felagsskapin. Tí leggja fyrireikararnir dent á góð evni og familjuvinarlig støð.

Bíbliutímarnir eru aðruhvørja viku, og tá teir ikki eru, savnast ein lærubólkur, har høvuðsevni í kristnu trúnni verða viðgjørd.

Evnisdagar verða eisini fyriskipaðir, og í morgin verður ein tílíkur, har evnið verður bíbliulesnaður og andaktslív.

Á skránni ein tílíkan evnisdag eru bæði framløga og felagsprát um evnið. Tá dagurin er við at enda, verður ein felagsnátturði. Og sum vanligt, verður so møti í kjallaranum í Eliaskirkjuni leygarkvøldið.

## Upplagdur møguleiki

Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni hevur nú nøkur ár aftan fyri seg. Tað byrjaði í 1980 við, at nøkur komu saman til bíbliutímar í heimunum. Árið eftir, varð virksemið so víðkað til eisini at umfata møti í Eliaskirkjuni annaðhvørt leygarkvøld. Men ikki fyrr enn frá 1989 hava møti verið hvørt leygarkvøld.

Sunnudagsskúlin byrjaði í 1992, og á heysti í 97 var fyrsta møti uttan fyri Keypmannahavn. Árliga legan hevur verið á hvørjum ári síðan byrjan.

– Hjá trúgvandi ungdómi, ið fer niður at nema sær kunnleika, er alneyðugt at koma í ein kristiligan felagsskap. Vit halda arbeiðið vera eitt gott tilboð til føroyingar, sum búseta seg í Keypmannahavn og nærhendis, stendur at lesa í faldaranum um føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni.

Arbeiðið er sjálvstøðugt við sama játtanargrund-arlagi sum Fólkakirkjan. Eitt 5-mannastyri stendur fyri arbeiðinum, sum er bygt á bíbilsku skriftirnar og evangelisku luthersku játtanina hjá Fólkakirkjuni, sum tulking av teimum heilagu skriftunum.

Arbeiðið hevur til endamáls, at boða gleðiboðskapin, at styrkja hin kristna felagsskapin og at kalla til trúboðan úti og heima.

Í faldaranum stendur eisini, at føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni er ein upplagdur møguleiki hjá føroyingum, sum leita sær til Keypmannahavnar, at hitta landsmenn í góðum og uppbyggjandi felagsskapi.




*Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni hevur 14 ár á baki. Tað byrjaði við bíbliulesnaði í heimunum í 1980*

# Grindin í føroyskum sjógvi

**Hvalirnir, sum fingu sendarar ásettar í Sandavági í summar, og sum enn lata færtta ordiliga frá sær, eru nú aftur í føroyskum sjógvi**

GRIND

Grindahvalirnir, sum fingu sendara ásettan í Sandavági tann 25. august, eru nú aftur í føroyskum sjógvi eftir at hava verið ein túr yviri móti norsku strondini.

Tað søgdu teir frá í gjár. Tó eru tað bara tríggir, sum senda regluliga og geva positión, sigur Náttúrugripasavnið á heimasíðu síni. Og teir tríggir fylgjast.

Onkur av hinum sendir eitt signal soleiðis av og á, men teir geva onga positión, so ikki ber til at siga neyvt, hvar teir eru. So fyri tann skuld kunnu teir væl vera í somu grindini, sum teir, ið boða ordiliga frá, hvar teir eru staddir.

**ej**




*Fylgisveinagrindin var í gjár í føroyskum sjógvi eystanfyri*



# Fólk í Kaldbak eru órógvað

**- Vit, sum sita í Kaldbaksnevndini, verða slett ikki eftirspurd, tá ið ræður um virksemið á Sundi. Vit halda, at vit longu hava ríkiligt av dálking og duni hinumegin fjørðin. Tískil ynskja vit asfaltverkið, sum bygt verður á Sundi, har piparið grør, og vit duga ikki at skilja, at nú er uppá tal at leggja eina fríhavn á Kaldbaksfirði, har eingin streymasjógvur er, sigur Edit Vang, sum er limur í Kaldbaksnevndini**

DÁLKING OG DUN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Vit vóna, at býráðsmyndugleikarnir í høvuðsstaðnum í størri mun enn higartil fara at taka Kaldbaksnevndina við upp á ráð, tá ið ræður um Kaldbaksfjørð og økið á Sundi, sigur Edit Vang, sum er limur í Kaldbaksnevndini*
*Mynd: Jan Muller*

Fólk í Kaldbak eru órógvaði.

Hinumegin fjørðin hava tey í fyrsta lagi Sundsverkið á Sundi og komunalu brennistøðina á Sandvíkarhjalla, og nú verður nýtt asfaltverk bygt á Sundi.

Seinastu tíðina hevur eisini verið frammi at leggja eina fríhavn á Sundi, har eitt nú russiskir trolarar, sum nú liggja á Havnarvág, kunnu umskipa, bunkra og annað.

Vesturættirnar eru tær, vit hava mest av, og tí kann ikki útilokast, at ein ávísur dálkingarvandi er til steðar, tá ið kaldbaksfólk bæði hava brennistøð, el-verk og nú eisini fáa asfaltverk beint hinumegin fjørðin.

Á Kaldbaksfirði er aling, og eisini hevur ein ávís hummaraveiða verið á fjørðinum.

## Óhugnaligt

Martin Justesen, sum býr í Kaldbak, var fram við á Sosialinum mikudagin.

Hann heldur, at tankin um fríhavn á Sundi tykist óhugnaligur, tí so stutt er um fjørðin, og einki rák er á fjørðinum.

- Tað er eingin ivi um, at dunið frá stóru trolarunum, sum ætlandi skulu liggja á Sundi, fer at órógva býlingarnar í Kaldbak og ikki minst nýggja býlingin Á Fløtu, sum liggur nakrar fáar hundrað metrar yvir av.

Hann vísir á, at tað var ikki lítið, sum hoyrdist til nýggju motorarnar á Sundi, tá ið hesir komu.

– Tað ljóðaði, sum um ein stórur bussur stóð uttanfyri dyrnar alla tíðina. Ikki fyrr enn kaldbaksfólk gjørdu vart við hetta í bløðunum, varð bøtt um hesi viðurskifti. Nú hoyrist lítið til motorarar longur, og tað fegnast vit um.

Martin fýlist á, at eingin alment hevur gjørt vart við, at asfaltverk nú eisini verður bygt á Sundi.

Nú talan eisini er um at leggja eina fríhavn beint yvir av býlingunum í Kaldbak, helt hann, at hann ikki kundi tiga longur.

– Jú, tað er óhugnaligt at ímynda sær, at tann stóri russarafloti, sum mangan liggur á Havnarvág, nú kanska skal flytast inn á Sund. Tað er nóg ringt, at hann liggur á reduni og larmar. Inni á Sundi eru fjøll, og tað er óhugsandi, at larmurin ikki fer at órógva bygdarlívið í Kaldbak.

Martin Justesen sigur, at hann eisini stúrir fyri dálking, um ætlanin við fríhavnini á Sundi verður veruleiki.

– Aftrat øllum, sum her er nevnt, hevur einki verið frammi um radararnar á Sornfelli, sum geva kraftmiklar stálir frá sær, sigur hann at enda.

## Ikki eftirspurd

Á hvørjum kommunuvali verða trý fólk úr Kaldbak vald í eina sonevnda Kaldbaksnevnd. Tveir aðrir limir eru í nevndini, sum eru politiskt valdir. Formaður er borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen.

Tey, sum umboða Kaldbak í nevndini í løtuni, eru Edit Vang, Elsuba Vang og Petur Nolsøe.

Edit sigur, at áður var Sund ein partur av Kaldbaks sókn, og hon meinar, at Kaldbaksnevndin upprunaliga eisini fevndi um tey, sum búðu á Sundi.

– Men tað vísir seg í dag, at vit hava onga ávirkan á, hvat gongur fyri seg á Sundi, og vit verða snøgt sagt ikki eftirspurd.

Hon sigur, at lokalu umboðini í Kalbaksnevndini av sínum eintingum tóku málið um nýggja asfaltverkið á Sundi upp á fundi í nevndini undir "ymiskt".

– Hóast vit mótmæltu verkætlanini harðliga og mótmæltu, at málið ikki er tikið upp í nevndini, fingu vit bara at vita, at málið er avgreitt. Okkum dámar slett ikki, at asfaltverk verður bygt á Sundi, og vit ynskja verkið, har piparið grør, sum hon tekur til.

Edit sigur, at tað tykist, sum um Tórshavnar býráð heldur seg kunna leggja allan "lort" á Sundi uttan at spyrja Kaldbaksnevndina um nakað sum helst.

– Okkara meining er, at Kaldbaksnevndin framvegis eisini eigur at fevna um Sund, og tí kenna vit okkum sett til síðis, tá ið ræður um útbyggingar og ætlanir á Sundi, sum liggur beint yvir av okkum, sigur hon.

## Við upp á ráð

Edit sigur, at málið um umrøddu fríhavnina á Sundi er so nýtt, og tí hava tey ikki tikið hetta málið upp í Kaldbaksnevndini.

– Okkum dámar slett ikki, at ein møgulig fríhavn í Føroyum verður løgd á Sundi, og hesum fara vit at mótmæla harðliga.

Hon sigur, at tey onkuntíð hava hildið, at olja lekur úr Sundsverkinum, men teimum er sagt, at talan er um kølivatn, sum hevur nakað av olju við sær.

– Hetta hevur higartil ikki verið ein stórur trupulleiki, men tað er ikki so sjáldan, at tað bráar inni á fjørðinum.

Edit heldur, at nú so nógv er frammi um, at olja verður mist á sjógv undir bunkring, er tað ræðandi at hugsa sær, at ein stórur trolarafloti kanska fer at liggja á Sundi í framtíðini.

Hon sigur, at áðrenn bøtt varð um dunið frá nýggju motorunum á Sundsverkinum, kundu myndir á vegginum og veggir ristast.

– Umframt at dunið hoyrdist yvir um fjørðin, merktust ristingarnar nógvastaðni í bygdini, sigur hon.

Edit sóknast eisini eftir árinskanningum í samband við brennistøðina á Sandvíkarhjalla.

– Eg havi skilt, at fleiri kanningar eru gjørdar í Leirvík í samband við brennistøðina á Hagaleiti, og har er mær vitandi staðfest, at seyður, sum gongur uppat økinum, er meira fongdur við dioxin, enn seyðurin í haganum har norðuri annars er.

Edit Vang sigur seg at enda vóna, at býráðsmyndugleikarnir í høvuðsstaðnum í størri mun enn higartil fara at taka Kaldbaksnevndina við upp á ráð, tá ið ræður um Kaldbaksfjørð og økið á Sundi.

# Ársins "guliganz" á bryggjuni í Gøtu

**Áskoðararnir hjá NSÍ, ið rópa seg "guliganz", hava aftur í ár kosið ein "ársins guliganz-leikara". Ungi maðurin, sum fekk heiðurin í ár, arbeiðir á Fiskavirkinum í Gøtu, har hann fekk heiðurslønina mikudagin**

HEIÐURSLØN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Guliganz-formaðurin, Bogi Hansen, handar Óla Hansen, sum áskoðararnir hjá NSÍ hava kosið at vera "ársins guliganz-leikara", steyp og kekk í heiðursgávu*

Í nøkur ár hava áskoðararnir hjá NSÍ, sum rópa seg "guliganz", kosið ein av leikarunum at vera "ársins guligans-leikara".

Nú fótbóltskappingin er liðug, hava áskoðararnir gjørt av, at Óli Hansen, verjuleikari hjá NSÍ, skal fáa henda heiður í ár.

Handanin av heiðurslønini fór fram mikudagin á arbeiðsplássinum hjá Óla, sum er Fiskavirkið í Gøtu.

Áskoðararnir halda, at Óli hevur havt eitt fram úr gott ár í miðverjuni hjá NSÍ í ár, tó at tað hevur gingið misjavnt hjá 1. deildarliðnum hetta kappingarárið.

Óli heldur, at útlitini fyri komandi kappingarár og vónirnar um eitt enn betri úrslit, eru góðar.

– Eg ynski at takka øllum viðhaldsfólkunum hjá NSÍ fyri dyggan stuðul, og eg vóni, at stuðulin komandi ár verður minst líka so góður, sigur "ársins guliganzleikari" hjá NSÍ.

Umframt "guliganzsteyp", fekk Óli Hansen eisini ein kekk áljóðandi kr. 3.000, sum er latin av R.L.O. Entreprenørum saman við áskoðarum hjá NSÍ.

Tað var guliganz-formaðurin, Bogi Hansen, sum handaði verjuleikaranum heiðurslønina.

Ársins guliganz-leikari í fjør var Messias Pereira, og í 2002 varð Arnfinn Langgaard kosin ársins leikari hjá NSÍ.